# Lógasavnsmennari

*Innlendismálaráðið sóknast eftir einum starvsfólki til Kunngerðablaðiðog logir.fo.*



Hevur tú hug at arbeiða við lýsing av rættarreglum og talgilding í einum politiskum umhvørvi, so er hetta starvið í Innlendismálaráðnum kanska nakað fyri teg.

**Um okkum:** Innlendismálaráðið er fyrisiting hjá landsstýriskvinnuni í innlendismálum og er skipað í fýra fakøki: lógamál, kommunumál, náttúrumál og samferðslumál.

Missiónin hjá Innlendismálaráðnum er innan hesi øki at veita landsstýriskvinnuni ráð, tryggja haldgott grundarlag og at gera hugskot til veruleika.

Í ráðnum arbeiða 14 starvsfólk, harav 10 eru akademikarar.

**Arbeiðsuppgávur:** Tú kemur at arbeiða sjálvstøðugt og verður partur av fakøkinum lógamál.

Tú kemur at hava ábyrgdina av umsitingini og menningini av Kunngerðablaðnum og lógadátusavninum logir.fo. Tú skalt eisini fyriskipa og stýra eini verkætlan um at talgilda Kunngerðablaðið.

Í Kunngerðablaðnum skulu lýsast allar løgtingslógir, kunngerðir, reglugerðir og aðrar almennar fyriskipanir, sum givnar eru av Landsstýrinum. Lýsingin í Kunngerðablaðnum er einasti bindandi kunngerðarhátturin av løgtingslógum o.ø. Kunngerðablaðið kemur út, so ofta tørvur er, tó í minsta lagi eina ferð hvønn mánað.

Logir.fo er ein internettænasta, har borgarar, vinnulív, stovnar og aðrir myndugleikar kunnu leita sær skjóta kunning um galdandi løggávu í Føroyum. Vit arbeiða í løtuni við eini nýggjari lógasavnsskipan, sum vit ætla, at tú skalt fáa av bakkastokki.

Tú skalt eisini arbeiða við at talgilda Kunngerðablaðið. Í dag verður Kunngerðablaðið útgivið í pappírsútgávu, men vit ynskja at leggja tað um og geva tað út í talgildari útgávu.

**Um teg:** Tú skalt hava viðkomandi útbúgving, hava góðan telduførleika og duga at skanna tekstir (OCR). Tær dámar at arbeiða sjálvstøðugt, tú sýnir ábyrgd og skilvísi, fert væl um, hevur gott skil á og ert reglubundin. Tú ert ágrýtin, og tær dámar væl avbjóðingar og at vera vil til at menna skipanir. Tú dugir at arbeiða saman við øðrum.

Tað er avgjørt ein fyrimunur, um tú hevur royndir sum verkætlanarleiðari. Tað er eisini ein fyrimunur, um tú hevur løgfrøðiligan førleika ella kunnleika, antin ástøðiliga ella av royndum.

**Vit bjóða:**
- Eitt áhugavert, sjálvstøðugt og avbjóðandi starv í einum aðalráði í menning
- Góðar møguleikar fyri fakligari og persónligari menning
- Løn sambært viðkomandi sáttmála

**Meira at vita:** Tú kanst fáa meira at vita um Innlendismálaráðið á www.imr.fo.

Eru spurningar, ert tú vælkomin at ringja til Nellu Festirstein, deildarstjóra, tlf. 55 80 76.

**Umsóknir:** Umsóknir skulu sendast til Innlendismálaráðið, Postrúm 158, Tinganes, 110 Tórshavn, og skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. november 2009.

Les meira á www.imr.fo

INNLENDISMÁLARÁÐIÐ

SENDISTOVAN

Bilvask
Vit vaska bilin innan og uttan.

Verkstaður
Dekk, oljuskift og smáar umvælingar.

Leigubilar
Persón- og vøruvognar. Góðir og bíligir bilar.

Flutningshjálp
Vit flyta bilar, maskinur o.m.a.

Stiðjagøta 3 · 100 Tórshavn · tel: 358888 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo

# Hølir til leigu

**Úti í Stiðjagøtu 3 eru 110 m² hølir við 7 rúmum og eini 230 m² høll við portri 4 m breidd 3 m hædd í einum til leigu.**

**Alt kann innrættast eftir ynski.**

BILRØKT
*Borgar fyri góðsku...*

